Februar 2018

betri

# HVØRJAR TRYGGINGAR KANN FELAGIÐ TEKNA

**SKAÐI Á OGNIR/LUTIR**
Um felagið eigur bygning, kann felagið tekna eina bygningstrygging. Tørvurin fyri trygging er ymiskur, og saman kunnu vit samanseta eina trygging, ið hóskar júst til tykkara tørv.

Eigur felagið ognir, ið eru á goymslu í egnum ella leigaðum hølum, kann ein leysafætrygging verða teknað.
Við eini leysafætrygging fær felagið eina trygging, ið dekkar innbúgv, maskinur, vørur og leysalutir.
Um felagið eigur bát, kann bátatrygging teknast.

**AKFØR**
Eigur felagið akfar, er ábyrgdartryggingin lógarkravd. Harumframt kann veljast millum fleiri sløg av skrokktryggingum.

**SKAÐI, IÐ TIT KUNNU GERA Á ONNUR**
Er tykkara virksemi orsøkin til, at skaði hendir á fólk ella lutir, kunnu tit fáa eitt stórt endurgjaldskrav. Vinnuábyrgdartrygging veitir endurgjald fyri ta endurgjaldsábyrgd, sum tit eru fevndir av, og verjir teg móti endurgjaldskrøvum, sum eru ógrundað.

**SKAÐI Á TYKKUM**
Felagið skal tekna Arbeiðsskaðatrygging fyri:

- Sáttmálasettar venjarar
- Sáttmálasettar leikarar
- Onnur starvsfólk í starvi hjá felagnum t.d. húsavørðar og reingerðarfólk

Tryggingarskylda er ikki fyri limir, ið luttaka í ymiskum tiltøkum, sum felagið skipar fyri t.d. køkutombula.
Um felagið ynskir, at hesi fólk skulu verða tryggjað, kann ein sjálvboðin arbeiðsskaðatrygging teknast fyri hesi fólkini.

**IKKI SÁTTMÁLASETTIR LEIKARAR OG VENJARAR**
Hesir eru tryggjaði í felags vanlukku-tryggingini hjá ÍSF.

**FÁ MEIRA AT VITA**
Vilt tú vita meira, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum og fáa nærri vegleiðing frá einum av okkara ráðgevum.

**Betri Trygging P/F**
Yviri við Strond 2
Postsmoga 34
110 Tórshavn

Tel +298 345 600
trygging@betri.fo
www.betri.fo